*Atlantsljómur II og Summartónar 2000Tónleikur: Johannes Brahms (1833-1897)*

# Vit eru á fer›

*Ein má undrast á, at so væl er komi› burturúr eftir bert nøkrum venjingum í einari viku, sigur ummælari okkara m.a. um framførsluna av Ein Deutsches Requiem hjá Brahms, sum var í Nor›urlandahúsinum leygarkvøldi›*

**AkademischesFestouverture op. 80**
**Schicksalslied op. 54**
**Ein Deutsches Requiem op. 45**

**Dirigentur:**
Yaacov Bergman
**Sopran:**
Berghild Poulsen
**Bariton:**
Lars Thodberg Bertelsen
**Orkestur:**
Austrian Art Ensemble
Sandnes Orkesterforening
Føroyskir tónleikarar
**Kór:**
Limir úr Dania Sonans
Ginnungagap
Havnakóri› og a›rir sangarar.

***"Her mitt í sjónum***
***her mitt í øllum vøtnum***
***ta› syngur allasta›ni:***
***Vit eru her.***
***Her flúgva fuglar***
***hvønn morgun yvir havi›***
***vit vita eisini:***
***Vit eru á fer›"***

Vi› hesum broti› úr "Okkara land" úr SKEYK og annars vælvaldum or›um um stóru menningina í føroyska tónleikalívinum og eina tøkk til øll tey, sum leggja stórt arbei›i í at skipa fyri verkætlanum sum hesari, bey› Høgni Hoydal øllum vælkomnum til konsert í Nor›urlandahúsinum leygarkvøldi› 1. juli. Høvi› var framførslan, sum arbeitt hevur veri› ímóti í verkætlanini "Atlansljómur II"

## Vi› fyri at læra

Og eitt er heilt sikkurt: ta› syngur allasta›ni. Ta› ‡ur av tónleikarum og sangarum runt um í Føroyum. Vit hava sjálvi eitt ótal av kórum og sangbólkum, og tá so útlendskir tónleikarar og kór koma á vitjan okkum í vár- og summarmána›unum, fer ta› at syngja allasta›ni og næstan allatí›ina. Hvønn einasta dag eru upp til fleiri konsertir kring landi›. Einki undur í, at ikki allar ver›a líka væl vitja›ar, og helst ikki nú, tá ve›ri› hevur veri› so gott, at nógv hava hug at vera uttandura.

Hóast konsertin var væl l‡st, bæ›i í fjølmi›lunum og vi› plakatum, var heldur ikki útselt hetta kvøldi›. Ein skuldi annars vænta› ta›. Hóast heilt fitt av fólki hev›i leita› sær ni›an í Nor›urlandahúsi›, var høllin ikki heilt fullsett.

Og sum Høgni eisini seg›i, so eru slíkar stevnur vi› til at vísa, at "Vit eru her". Summartónar, Jazz-, Fólka- og Blues Festival og onnur tiltøk eru vi› til at seta Føroyar á heimskorti›.

Ta› er so ta›. Eitt anna› gott vi› slíkum stevnum er, at vit fáa høvi at vera vi› í slíkum stórverkum sum Brahms Requiem og teimum, sum kanska eru enn meiri krevjandi. Vit føroyingar eru á mangan hátt væl fyri sangliga og tónleikaliga, men vit hava gott av at syngja og spæla saman vi› útlendingum, sum eru meiri lærdir enn vit sjálvir eru. Á mangan hátt "eru vit vi› fyri at læra". Á kórstevnuni í ár sungu føroysku luttakararnir "Sacred Consert" saman vi› Tritonus Kórinum hjá John Højby. Tey dugdu verki› frammanundan og vóru á einum hægri sangtekniskum stø›i enn flestu okkara. Mær dámar væl hendan arbei›sháttin: tann óroyndi ver›ur sty›ja›ur og hevur gó›ar fyrimyndir undir li›ini á sær. Úrsliti› er, at vit fáa nógv burtur úr, læra nógv.

Eg billi mær inn, at solei›is hevur eisini veri› í hesum føri - vi› venjingini av tónleikinum hjá Brahms, hóast b‡ti› millum roynd og óroynd var eitt anna› enn til kórstevnuna. Úrsliti› - konsertin - var í hvussu er ógvuliga gott.

Tey luttakandi - u. 110 sangarar og u. 50 tónleikarar - sótu longu klár tá áhoyrarnir komu í høllina. Tú fekk beinan vegin kenslu av, at tú kom til naka› stórsligi› og fullfíggja›. Tey luttakandi hava óiva› fingi› veglei›ing um gó›an atbur› á palli. Onki skav og ongir nótar ni›ur á gólvinum o.s.fr., slíkt sum bæ›i kann órógva framførsluna og áhoyrarnar. Luttakararnir vóru allir í svørtum, hóskandi til høvu›spunkti› á skránni, eina dey›smessu, eitt Requiem.

## Kalt eftir rygginum

Fyrst á skránni, sum øll var vi› tónleiki eftir t‡ska tónaskaldinum Johannes Brahms, var Akademisches Festouvertura. Hetta er veitslukendur orkesturtónleikur, sum Brahms hevur sett saman av ymsum studentarsangum, m.a. "Gaudiamus igitur". Orkestri› kom væl frá framførsluni og ein merkti at Yaacov Bergman hev›i sera fasta og grei›a lei›slu og eitt gott tak á tónleikarunum. Hetta var eitt ey›kenni vi› allari konsertini. Bara at hyggja at honum var ein fragd.

Men eitt var hann kanska ikki harri yvir, og ta› var javnvágin í orkesturljó›inum. Eftir mínum tykki vóru ikki nóg nógvar violinir, kanska eina mest 1. violinir, til at geva ta› stóra súsi›, sum í besta romantiska stíli kom fyri fleiri fer›ir í konsertini. Tær rúgva›u ikki nóg miki›. Eisini sakna›i eg eitt naka› t‡›iligari bassljó›. Har vóru 4 kontrabassar og 5 celli. Kanska áttu fleiri kontrabassar at veri› vi›.

Næst á skránni var "Schicksalslied", har Brahms hevur sett tónleik fyri kór og orkestur til or› eftir t‡ska romantikaranum Friedrich Hölderlin. Hetta var vakurt framført bæ›i av orkestri og kóri og ta› fór at renna kalt ni›ur eftir rygginum tá ein hoyrdi teir 110 sangararnar syngja saman fyri fyrstu fer›. Kóri› sang reint og fylgdi væl teimum ávísingum í dynamikki og tónleikaligum skapi, sum lei›arin framan fyri teimum gav. Hetta er romantiskur tónleikur, so ta› munar. Ta› eru tey stóru kensluligu strokini, sum Brahms málar vi›. "Stóru dragandi linjurnar og kensluríka innihaldi› ey›kenna henda tónleik og hava gjørt navni› Brahms elska› og virt ....." stendur m.a. skriva› í skránni. Hetta eru beinrakin or› um tónleikin hjá Brahms. Hóast framførslan eftir okkara málistokki var fyrsta floks, hev›i undirrita›i varhuga av, at lei›arin kundi havt fingi› serliga kórsangararnar at gjørt framførsluna eitt sindur meiri "dragandi" vi› at fingi› teir til at sungi› vi› meiri stu›li undir sanginum og harvi› fingi› meiri kropsliga d‡bd í einstøku tónarnar. Men her er talan um grundleggjandi sangteknikk, sum ein kanska ikki lærir til fullnar uppá eina viku.

## Kantata og Requiem

Eftir ste›gin var Ein Deutsches Requiem á skránni.

Men á›renn vit komu so langt vór›u nøvnini á teimum, sum høvdu gjørt tey tr‡ vinnandi uppskotini til n‡ggju Ólavsøkukantatuna, kunngjørd og vir›islønir latnar. Kórsamband Føroya, sum hevur skipa› fyri kappingini, hev›i einki vi› konsertina at gera annars,n‡tti bara konsertina sum eitt hóskandi høvi.

At Brahms var innhugsin og hev›i heldur tungt sinnalag fingu áhoyrarnir í ríkt mát at kenna á konsertini sum heild. Ein Deutsches Requiem er eins og Schicksalslied í tí "tyngra endanum" av tónleiki hansara. Ta› er í 7 pørtum, sum íalt vara›u í einar 70-80 minuttir. Hóast messan fellur í tveir høvu›spartar, har partarnir 4-7 lei›a tankarnar móti uppreisn og himmalskari sælu, me›an partarnir 1-3 meiri eru merktir av sorg og klagu, gongur ein trá›ur av tunglyndi gjøgnum alt verki›. Heldur ikki í sjálvum endanum, sum er ein lovprísing, er Brahms, hóast hátí›arligur, veitsluh‡rdur.

## Á fer›

Kanska kom tunglyndi› at merkja kvøldi› í meira lagi. Eg helt meg eisini hoyra, at sangarunum vóru farnir at mø›ast móti endanum. Kanska skuldi okkurt lættari verk enn "Schicksalslied" veri› valt á›renn ste›gin. Í hvussu er kendist ta› gott hetta gó›ve›urskvøld at syngja "Einki er sum summarkvøld vi› strendur", sum gjørt bleiv í samband vi› handanina av vir›islønunum.

Men hetta tekur einki frá tí stórfingna›, tí vakra og tí dragandi tónleikinum, sum vit í salinum fingu at hoyra. Ein má undrast á, at so væl er komi› burturúr eftir bert nøkrum venjingum í einari viku. Sjálvt um Havnakóri› hevur sungi› verki› fyrr, mugu venjingarnar hava veri› munagó›ar, tí sum heild virka›i framførslan gjøgnumførd og fullfíggja›.

Eisini komu songsolistarnir væl frá sínum pørtum. Barytonsoloina í pørtunum III og VI hev›i danin Lars Thodberg Bertelsen og sopransoloina í parti V hev›i okkara egna Berghild Poulsen. Ein hoyrdi Berghild leggja nógva sál í framførsluna. Hon hevur eina stóra og vakra rødd, sum tóktist at egna seg væl til verki›. Og hon hoyrdist væl ímillum øll ljó›før›ini. Sama kann ikki sigast um røddina hjá Lars Thodberg Bertelsen. Hon bleiv fleiri fer›ir køvd serliga av træblásarunum, uttan tó at talan var um nakra vanlukku. Ta› var stuttligt at hoyra hann veruliga bera sangin fram, og til tí›ir sum ein sjónleikari tulka partar og smálutir í tekstinum.

Alt í alt eitt tónlistarligt avbera gott kvøld, sum vísir, at vi› kønari veglei›ing uttaneftir og samstarvi vi› grannarnar "Eru vit á fer›".

**Ummæli: ZS**
**Myndir: Johan Jacobsen**

# Ungir vinnarar

*Tróndur Bogason og Dánjal Hoydal vunnu kappingina um n‡ggju ólavsøkukantatuna. Leygarkvøldi› handa›i Ólavur Hátún teimum vir›islønina*

DAGFINN OLSEN

Fyri nøkrum mána›um sí›ani var› útskriva› kapping um at skriva eina n‡ggja ólavsøkukantatu.

Tá freistin var úti, vóru 7 verk komin inn til dómsnevndina at taka stø›u til. Forma›ur í nevndini var Sunleif Rasmussen.

Til framførsluna av Requiem hjá Brahms í Nor›urlandahúsinum leygarkvøldi›, var› eisini avdúka›, hvørjir vinnararnir av kantatukappingini vóru.

Og ta› var av sonnum yngra ættarli›i›, i› var í fremstu rø›.

Vinnarar gjørdust Tróndur Bogason og Dánjal Hoydal. Tróndur eigur tónleikin og Dánjal or›ini í hesum samstarvinum. Og ta› eru ungir menn, i› vi› dugnaskapi og hegni enda›u á ovastu rók í kappingini. Teir eru bá›ir 24 ára gamlir.

Hetta er fyrsta fer›in, at teir saman royna seg í tvíb‡tum samstarvi. Tróndur er royndur tónasmi›ur og er nú undir útbúgving sum slíkur. Hann hevur á›ur vunni› kapping um kórverk, sum Tórshavnar Manskór skriva›i út.

Næstir vinnarunum gjørdust Kári Bæk og Hanus Kamban. Kári eigur tónleikin og Hanus or›ini.

Á 3. pláss komu Knút Olsen og Sólrun Michelsen. Knút er kendur fyri at eiga mangar perlur innan føroyskan kórtónleik. Í hesum samstarvinum er ta› eisini hann, i› eigur tónleikin og Sólrun eigur or›ini.

Ætlanin er, at n‡ggja ólavsøkukantatan skal framførast á Tinghúsvøllinum á ólavsøku. N‡ggja kantatan skal tó ikki avloysa gomlu kantatuna, men tær skulu liva li› um li›.

Sunleif Rasmusen metti í samrø›u í Útvarpinum, at verkini, i› gjørdust nummar 2 og 3 eiga eisini at fáa høvi at ver›a framførd, tí ta› hava tey uppibori›. Hann seg›i tó, at ringt var ikki at taka dagar ímillum og velja bestu kantatuna.

Sta›festast kann, at yngra ættarli› kom á ovastu rók í kantatukappingini hjá Kórsambandi Føroya og hervi› eru eisini lunnar lagdir undir vónir um gró›rarlíkindi, og at í framtí›ini eiga vit klettar at byggja á.

Fyrsta vir›islønin er 40.000 krónur.

# Ættarli›sskifti í stjórnini

*Fríggjadagin var móttøka hjá Tryggingarfelagnum Føroyar. Felagi› er 60 ár og samstundis fer ættarli›sskifti fram í stjórnini*

DAGFINN OLSEN

Fríggjadagin var móttøka hjá Tryggingarfelagnum Føroyar. Felagi› var› 60 ár 1. juli.

Samstundis var hetta sí›sti dagur sum forstjóri hjá Jens Peter Arge. Gunnar í Li›a tekur vi› eftir hann sum forstjóri.

Í lei›sluni fyri tryggingarfelagi› Føroyar sita nú Gunnar í Li›a, forstjóri, og Mortan Poulsen, stjóri.

Jens Peter Arge helt rø›u í samband vi› dagin. Hann l‡sti felagi› í søguligum ljósi og greiddi frá søgu og virksemi.

Sí›ani kom hann til broytingarnar, sum nú fara fram.

Hann seg›i, at í 1998 var samtykt í samband vi› n‡ggja bygna›in í felagnum, at stjórnin skuldi mannast vi› tveimum limum. Eisini var› avgjørt, at ættarli›sskifti í stjórn felagsins skuldi henda á 60 ára degi felagsins.

Jens Peter Arge seg›i í rø›u síni, at nevndin tók hesa tilrá›ing til eftirtektar og avtala› var eisini, at Jens Peter Arge heldur fram sum rá›gevi hjá nevnd og stjórn til hann fyllir 65 ár. Hann gerst um gó›an mána› 64 ár.

Í grannalondum okkara er vanligt, at stjórar innan tryggingar- og fíggjarfyritøkur fara frá um 62 - 63 ára aldur. Jens Peter Arge helt tí tí›ina hóska til ættarli›sskifti›. Og hann heldur vera rætt, at teir sum, skulu liva vi› broytingunum í framtí›ini, taka vi› nú.

Jens Peter Arge greiddi frá, at ta› eru 27 ár sí›ani, at hann byrja›i í gamla samtakinum, Tryggingarsambandinum. Jens Peter Arge gjørdist stjóri í 1989, eftir at táverandi stjórin, Marius Thomasen brádliga doy›i. Jens Peter Arge gjørdist forstjóri í 1998.

Hann metir hetta at hava veri› áhugaverd ár.

Hann takka›i vi›skiftafólki, starvsfólki, hinum stjórunum, nevnd, umbo›srá› og myndugleikunum fyri gott samstarv. Eisni ynskti Jens Peter Arge n‡ggja forstjóranum, Gunnari í Li›a, tillukku vi› n‡ggja starvinum og Mortani Poulsen alt ta› besta, nú teir eru tveireinir í stjórnini. At enda í rø›u síni ynskti Jens Peter Arge felagnum gó›an byr vi› vón um framhaldandi menning.

*Gunnar í Li›a tekur nú vi› sum forstjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar eftir Jens Peter Arge* Mynd: Jens K. Vang